## DAGSINS MEINING

# Liberalisma í hásæti

Støðan hjá alivinnuni og støðan hjá rækjuvinnuni vóru sum vera man frammaliga fyrsta dagin í orðaskiftinum um løgmansrøðuna. Tað er greitt, at hesar vinnur eru í svárum trupulleikum, og at hesir trupulleikar fara at elva til, at fleiri hundrað fólk fara at gerast arbeiðsleys. Men tað er somuleiðis greitt, at tað hvørki er politiskur hugur ella vilji til at gera nakað við hesar trupulleikar.

Bert ein av teimum, ið høvdu orðið, mælti til, at tað almenna skuldi gera nakað við hesar trupulleikar. Framsøgumaður Fólkafloksin mælti til at nýta pening úr Landsbankanum og vinningin av eini komandi privatisering av Føroya Banka til at endurreisa alivinnuna. Hetta hugskot var harðliga afturvíst av tjóðveldismonnum. Rækjuvinnuna var tað at kalla eingin, ið tók upp á tungu, uttan í sambandi við, at gamalliberalistiski boðskapurin um, at tað, ið ikki kann standa, má falla, var boðaður. Henda vinna er sleppt upp á fjall.

Tað áhugaverda við hesum parti av orðaskiftinum var, at vinstrahalli Tjóðveldisflokkurin hevur lært høgravenda Fólkaflokkinu alt um tey grundleggjandi politisku virðini í einum liberalistiskum marknaðarbúskapi! So er spuringurin bert, um Tjóðveldisflokkurin eftir hetta kann sær at kallas vinstrahallur. Bert ein røðari minti á, at tann, ið grundlegði liberalismuna og marknaðarbúskapin, ein ávísur harra Adam Smith, hevur sagt, at henda filosofi krevur, at hitt almenna tekur ábyrgd av offrunum fyrst tí harðrenda kapitalistiska marknaðarbúskapin. Annars var alt orðaskiftið eyðkent av eini búskaparligari nýkonservatismu, sum vildi frøtt eina Thatcher og ein Busch. Einastu boð, ið tingmenn høvdu uppá hjálp til alivinnuna, var at lata upp fyri, at útlendingar, skulu kunna eiga størri partar av av hesi vinnu. Rækjuvinnuni var eingin vón givin. Nú hava so hesar vinnur fingið greið boð og tað er bæði týdningarmikið og áhugavert. Mest áhugaverda við hesum parti av orðaskiftinum var tó hetta, at orðaskiftið avdúkaði, at gamaliberalisma av álvara er í hásætinum hjá samgonguni. Áhugavert var eisini, at orðaskifti vísti, at meiriluti ikki er fyri at lata pengastovnunum veðhald í aliloyvum. Vit venda aftur til løgmansrøðuna í hesum teigi.

**Sosialurin**

# Hjalti og Øssur aftur upp á spæl

**Teir báðir Hjalti Joensen og Øssur Johannesen hava givið út fløgu við guitar- og basstónleiki og er hetta teirra næsta fløga við hesum sermerkta tónleiki**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Hjalti Joensen og Øssur Johannesen hava áður givið út fløgu saman og var tað við tónleiki, leiktum á guitar og bass. Og teir eru aftur nú við eini fløgu, ið eisini inniheldur verk til guitar og bass.

Báðir eru teir kendir snillingar á ljóðføri síni. Hjalti hevur leikt við fleiri bólkum, t.d. Devon og Moirae og Øssur hevur givið út solofløgu við basstónleiki.

Øssur er eisini kendur listamaður og hevur teknað húsan á nýggju fløguni, ið ber heitið Hjalti Joensen Øssur Johannesen 2.

Fløgan er innspæld hjá Øssuri ( í Øssursa Húsið, sum tað stendur í húsanum) í Saltangará í januar/februar 2003 og heimaupptøkuhølunum hjá Hjalta. Hjalti ljóðblandaði í RMS studio í 2003.

Jón Heðin Tróndheim mastraði og myndirnar í fløguhúsanum tók Maria Olsen.

Tutl gevur fløguna út.




## VIÐMERKINGAR

# Uttanríkispolitikkur

**Hans Birgir Hansen**

**Tey grønu** virka fyri avvápna, men ikki fyri einhvønn prís. Vit virka fyri einum treytaleysum steðgi av mergsúgvingini av teim tilfarskomnu londunum, eins og vit harðliga ganga inn fyri einum neyðugum, meira rættvísum býti av ríkidømi jarðarinnar. Vit skiggja veruligu ella atomaru heimsumfevnandi vápnamenning, ið fer fram. Vit ynskja at fremja millumtjóða samstarv gjøgnum ST.

**Hvørki høgra- ella vinstravend**

»Tey grønu« kunnu ikki setast í bás sum høgra- ella vinstravend. Vit eru tað nýggja, ið kallað verður »Tey grønu í Føroyum«. Sum ein grøn grasrótarørsla og ein politiskur flokkur hava vit ávís grundleggjandi sjónarmið, vit standa saman um. Tað eru fyrst av øllum tey sjónarmið, vit standa saman um. Tað eru fyrst av øllum tey sjónarmið, ið eru ávíst í hesi framløgu. Men lívið er fjølbroytt og menniskjuni somuleiðis. Sum limur í »Teimum grønu í Føroyum« hevur tú sjálvandi fult frælsi at hava tíni egnu sjónarmið. Vit ynskja ikki at tit skulu stýrast, eins og aðrir flokkar krevja av sínum limum, tí tá er demokratiið misskilt.

Hóast »Tey grønu í Føroyum« eru ein politiskur flokkur, vilja vit sleppa tí vanliga kendu floksskipanum og floksdisiplin. Tiskil eru »Tey grønu í Føroyum« skipað í sjálvstøðugar bólkar, ið sjálv velja álitisfólk teirra. At tryggja eitt veruligt og vælvirkandi limademokrati savnast umboð fyri lokalbólkarnar í tí landsfevnandi umboðsráðnum, ið er ovasti myndugleiki »Teirra grønu í Føroyum«.

**Formæli**

Henda skrá er gjørd sum grundarlag fyri stovnan av »Teimum grønu í Føroyum«. Henda skrá er ætlað sum ein fyribilsskrá, ið kann leggja botn fyri framhaldandi kjaki millum øll tey, ið vónandi stuðla okkara komandi virksemi, nú vit á øðrum sinni venda okkum til almenningin. Vit halda tað vera náttúrligt, at eisini tygum, ið á fyrsta sinni taka undir við okkum, skulu hava ávirkan á arbeiði av eini meira fullfíggjaðari skrá. Uppskotið til hesa er heintað frá »Teimum grønu« í grannalondum okakra, serstakliga Danmark. Tó hava vit eftir førimuni royndt at tillagað skránna til føroysk viðurskifti. Henda fyribilsskrá fyri »Tey grønu í Føroyum« er ætlað til kjak, soleiðis at ein endalig skrá kann gerast. Vónandi eru tað nógv, ið vilja hjálpa okkum.

**Now or never við breiðari semju**
(i hesum umfari)

gev Jóannesi almannamál ella fíggjarmál
og verj tú, Høgni, mentamál, meðan tú mennist
sum politikkari og menniskja

Sjúrður Hansen, Gøtu

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.





*Endamálið við ovastevnuni er at savna inn pening til svimjihyl í Nólsoy, sum verður bygdur eystan fyri verandi skúla*

# 10'unda ovastevnan av bakkastokki

**Leisturin í ár verður hin sami sum undanfarin ár, siga fyrireikararnir**

OVASTEVNA
*Vilmund Jacobsen*

Mánakvøldið sat nevndin, sum fyrireikar ovastevnuna, á fundi og legði seinastu hond á skránna. Skráin er tó ikki almannakunngjørd enn, men fyrireikararnir siga, at leisturin verður hin sami, sum seinasta ár, tá ið stevnan eydnaðist avbera væl.

Hetta er tann 10'unda ovastevnan í røðini, ið ber navnið eftir nólsoyinginum, Ova Joensen, sum róði úr Nólsoy til Keypmannahavnar á sumri 1986.

Á longu leiðini um hav sat hann við árarnar í lítla báti sínum í meira enn 40 samdøgur, til hann umsíður náddi Longu-Linju og kundi kyssa kendu havfrúnna á klettinum í danska høvuðsstaðnum.

Hetta var málið, hann setti sær trý summur á rað. Tey bæði fyrru árini setti hann upp í Hetlandi, men "alle gode gange tre", sigur orðafellið, og soleiðis var eisini hjá Ova.

Endamálið við stevnuni er at savna inn pening til bygging av svimjihyli, sum stendur í gerð eystanfyri skúlan í Nólsoy.

**Svimjing og regatta**

Í fleiri ár hevur Erlendur Simonsen skipað fyri svimjing um Nólsoyarfjørð á ovastevnu, og soleiðis verður eisini í ár, nú hann verður hjálptur av Jákupi av Skarði við hesum stóra tiltaki.

Sum skilst, verður lagt á fjørðin úr Havn kl. 14 leygardagin.

Eitt annað tiltak, sum eisini er vorðið afturvendandi á ovastevnu, er regattasiglingin. Loyst verður á Eiði fríggjadagin, og síðan verður sett upp í Hósvík, har ligið verður til leygardagin. Út á seinnapartin leygardagin stevna regatta-bátarnir til Nólsoyar, har ovastevnan verður hildin.

Er veðrið gott, kemur ein hópur av bátum bæði úr Havn og av Skálafjørðinum út til Nólsoyar at halda stevnu.

Saman við bátunum, sum eru við í regattasiglingini, sær Nólsoyarvík út sum ein lýsandi "býur", tá ið leygarkvøldið kemur.

Í góðum veðri ber nógv til, og á ovastevnu seinasta ár vitjaði eitt ótal av bátum í Nólsoy.

**Kabarett og dansur**

Tað, sum flestu nólsoyingar serliga gleða seg til á ovastevnu, er afturvendandi kabarettin, ið savnar nógv bygdafólk og avbygdafólk. Flestu hendingar í kabarettini snúgva seg um lokalmál, men hesi verða so væl framborðin, at sjálvt tey, ið ikki kenna til smálutirnar, fara ikki vónsvikin heimaftur.

Kabarettin hevur verið eitt sera væl vitjað tiltak og ein týdningarmikil inntøkukelda á stevnuni.

Aftur í ár hava nólsoyingar dúgliga vant til kabarettina, sum verður sýnd fleiri ferðir um vikuskiftið.

Eins og undanfarin ár, verður eitt stórt tjald sett upp í skúlagarðinum, har dansur verður bæði fríggjakvøldið og leygarkvøldið.

Fríggjakvøldið spæla nólsoyingar, og tá verður Anfinn Nielsen, sum nú býr í Nólsoy, ætlandi gestasangari.

Leygarkvøldið spæla Kim Hansen og hansara menn. Kim er eisini nólsoyingur og hevur drúgvar royndir í tónleikalívinum.

Vit kunnu leggja aftrat, at á seinastu ovastevnu vóru ikki færri enn 800 fólk í dansi í tjaldinum í Nólsoy fríggjakvøldið og leygarkvøldið.

Eitt annað afturvendandi og sera væl vitjað tiltak á ovastevnu, er felagssangurin undir Mikkjalsveggi leygarkvøldið kl. 22.

Á ovastevnu verður eisini tivoli og matsøla umframt onnur tiltøk, sum vit fara at venda aftur til, tá ið skráin verður almannakunngjørd.

**Kaj Leo setir**

Tað verður Kaj Leo Johannesen, sum setir ovastevnuna í ár. Stevnan verður sett í Geilini kl. 14 leygardagin.

# Ein Højgaard afturat

RÆTTING
*Heri á Rógvi*

Í blaðnum leygardagin var drúgv frásøgn um ferðina hjá Højgaard familjuni í Svøríki. Men vit eru tíðanverri komin at gera teimum órætt. Skrivað verður, at av børnunum hjá Janu og Dánjal Peturi Højgaard eru bert tvey á lívi. Hetta er ikki rætt, tí ein triði sonur teirra, Andreas Højgaard, býr enn í Rituvík. Andreas, sum er fyltur áttati, hevur kortini ikki verið við á ferðunum. Vit biðja tykkum umbera mistakið.

**r t ðaravl ari til**
**t ið v r ri**

Sóknast verður eftir avloysara til útbering og koyring av posti á Tvøroyri og millum bygdir í norðaru helvt av Suðuroynni at byrja beinanvegin. Stóra koyrikoyrt krevst.

Skrivlig umsókn verður skjótast gjørligt at senda til:

**tver r a**
att.Elinborg Nolsøe, posthúsleiðari
800 Tvøroyri

# Tøkk

Eina hjartans tøkk til tykkum, ið mintust meg á 80 ára degnum 28. juli. Tøkk fyri vitjan, gávur, blómur og heilsanir.

Eina stóra tøkk til Dupultkvartettina í Ebenezer fyri vakrar sangir.

**Petur Christiansen**

# Tøkk

Øllum tykkum, ið gleddu meg á sjeytiára degnum tann 6. juli við gávum, brøvum, samrøðum, telegrammum og vitjanum, takki eg hjartaliga.

*Blíðar heilsanir*
**Viggo í Stórustovu**

# Ongar landingar á Sandi

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Seinastu tíðina hevur lítið og einki fiskaarbeiði verið í Sandoynni.

Virkið í Skopun fór í summarfrí næstsíðsta mánadag, men virkið á Sandi fer formelt ikki í summarfrí. Tó skilst, at ongar størri landingar verða á Sandi hesar komandi dagarnar.

Ætlandi verður virkið í Skopun stongt í tvær vikur.

Á Sandi siga tey, at onkur útróðrarbátur hevur avreitt, og tey hava eisini keypt eitt sløð av fiski á uppboðsølu.

- Men vit taka ongar størri landingar teir næstu dagarnar, meðan virkið í Skopun er í summarfrí, siga tey á Sandi.